# Handlar fullir av jólagávuhugskotum




Vit hava røttu jólagávuna til øll sum ganga, renna og íðka annan ítrótt, sigur Jakob Dam, dagligur leiðari í Thomas Dam Intersport í miðbýnum í Havn, sum hevur deildir á Glyvrum og í Klaksvík.

Thomas Dam Intersport hevur tríggjar handlar fullar av jólagávuhugskotum. Handilin í miðbýnum í Havn er í somu húsum sum Thomas Dam byrjaði at handla í av fyrstan tíð.

Thomas Dam byrjaði sítt handilsvirksemi í 1946. Fyrsti handilin var í Niels Finsensgøtu 5, har seldi hann glas, postalín og amboð. Seinni flutti glas- og postalínsdeildin til Niels Finsensgøtu 10, og Niels Finsensgøta 5 bleiv amboðshandil burturav.

Síðst í 60-unum byrjaði amboðshandilin eisini at selja fótbóltsgaggur og annað til ítróttarfólk. Tá so amboðsdeildin í 1977 flutti í egnan handilsbygning í Jónas Broncksgøtu, bleiv handilin í miðbýnum gjørdur um til ítróttarhandil við Thomas Hanus Dam sum stjóra. Í 1986 keypir Thomas Hanus Dam handilin, sum skiftir navn til Thomas Dam Ítróttur.

Í dag er Jakob Dam dagligur leiðari í fyritøkuni Thomas Dam Intersport, sum umboðar merkir sum t.d. Puma, Adidas, Hummel og Nike og selur alla úgerð til ítróttarfólk.

Jakob Dam, sum kemur frá "mr-harris" í Lyngby í Danmark, sigur, at hann leggur serligan dent á at hava væl útbúgvin starvsfólk og góða tænastu til kundan og ynskir øllum vælkomnum í handlarnar hjá Thomas Dam Intersport.

# Hetta er mín *jólasangur*

## Elsa Østergaard: *Mary did you know*

Sangurin “Mary did you know” er vorðin mær serliga góður tey seinastu árini, sigur Elsa Østergaard, sum er búsitandi í Hoyvík.
Kanska er tað tí at ein sjálv er vorðin so heppin at hava fingið tvey deilig børn, eg veit ikki. Tó so, hesin sangur - sum kanska er heldur øðrvísi enn aðrir jólasangir, við tað at hann vendir sær til Mariu, móður Jesu - lýsir væl tað barn sum jólini jú handla um.
Hesin Jesus sum føddist jólanátt, vaks upp, spældi sum barn, gjørdist tannáringur og síðani vaksin, eins og nógv av okkum. Óivað hevur mamma hansara gjørt sær tankar um, hvat lívið fór at bjóða soninum; tað gera foreldur jú.
Vit leggja ætlanir og til tíðir droyma vit dreymar, antin fyri ella vónandi við børnunum, um hvat ið framtíðin hevur at bjóða. Soleiðis hevur mamma Jesu óivað eisini gjørt. Men hóast hon alla tíðina visti, at sonur hennara var nakað serstakt, so hevur hon tó neyvan ímyndað sær alt tað, ið hann fór at gera ella tað hann skuldi ígjøgnum.
Eg ímyndi mær, og vóni, at míni egnu børn fáa eina góða og spennandi framtíð. Eg ynski teimum bæði avbjóðingar, spenning og succes í lívinum, og framum alt ynski eg teimum eitt friðsælt lív saman við barninum ið føddist jólanátt.
Míni børn eru mær longu til stóra gleði hvønn dag, men barnið ið føddist jólanátt er okkum øllum til óavmarkaða gleði og frið. Gott hevði verið, um vit høvdu hesa gleðina og henda friðin við okkum allar dagar á árinum, og ikki bert tá jólini standa fyri durum.



**ÓAVMARKAÐ GLEÐI**

*– Míni børn eru mær longu til stóra gleði hvønn dag, men barnið ið føddist jólanátt er okkum øllum til óavmarkaða gleði og frið, sigur Elsa Østergaard*

### *Mary did you know*

Mary did you know that your baby boy will one day walk on water?
Mary did you know that your baby boy will save our sons and daughters?
Did you know that your baby boy has come to make you new?
This child that you've delivered, will soon deliver you.

Mary did you know that your baby boy will give sight to a blind man?
Mary did you know that your baby boy will calm a storm with his hand?
Did you know that your baby boy has walked where angels trod?
And when you kiss your little baby, you have kissed the face of God.

The blind will see, the deaf will hear and the dead will live again.
The lame will leap, the dumb will speak, the praises of the lamb.

Mary did you know that your baby boy is Lord of all creation?
Mary did you know that your baby boy will one day rule the nations?
Did you know that your baby boy is heaven's perfect Lamb?
This sleeping child you're holding is the great I am.